

# Skjótt, lætt & gott

## Tá húðini tørvar vætu, er Body Mist olja tann mest vætugevandi

**Olive Oil - Dry oil mist v/ spray**
Sera vætugevandi lívrunnin olivenolja til vanliga og turra húð.
**199,-**

**Grape Seed Oil v/ spray.**
Er vínberjaolja, vunnin úr kjarnunum, at spraya á húðina. Oljan fellur sum sirm á húðina, og gevur vætu til øll sløg av húð. At nýta á kroppin.
**139,-**

**Hemp Dry oil spray**
Spray olja til turra og sera turra húð. Spraya á húðina, og gníggja oljuna eitt sindur.
Kann lindra um eksem. Inniheldur ongan anga og ongan lit; er tí sera vælegnað til viðkvæm húðasløg.
**169,-**

**Vitamin E. Dry Oil v/ spray.**
Oljan fer skjótt inn í húðina; oljan gevur vætu og verjir húðina. Spraya á allan kroppin, og kenn hvussu húðin gerst mjúk.
**149,-**

## Serlig røkt til andlitið

**Vitamin E. Weat Germ Oil.**
Olja til øll húðasløg; oljan gevur nógva vætu og verjir húðina. Virkar harafturat uppbyggjandi, og sigst at lindra óreina/arruta húð.
Kann nýtast morgun og kvøld.
**79,-**

Í The Body Shop hugsa vit um umhvørvið; kom við tínum tómu dunkum, so senda vit teir til eyndurnýtslu.

THE BODY SHOP
SMS • 31 95 05


# Olja gevur vætu



Oljur, ið verða nýttar innan kosmetik eru reinari enn t.d, olja ið verður nýtt í matgerð. Tær eru so væl sílaðar, at tað er eitt tað reinasta tú kanst bjóða húðini.

Olja hevur leingi verið kend fyri síni evni at hjálpa húðini at halda vætuna, men nú vísir tað seg, at olja eisini gevur vætu.

Kosmetikk-oljur hava oftast eitt sindur av einumhvørjum øðrum í eisini. Tað kann vera vitaminir, angi, ella onnur evni, ið innan húðviðger sigast vera til gagn.

Tað hevur víst seg, at oljur við vitaminum kunnu kjálpa ímóti óslættari húð.

Men tað finnast eisini reinar oljur, ið kunnu verða ein góð hjálp, um ein hevur sera turra húð (t.d. eksem)


Nýggjar uppskriftsbøkur frá SMART heimkomnar



BINDIBÚÐIN
SMS • Tel 31 55 66



www.veromoda.com



Handilin er stúgvandi fullur av tí nýggjasta nýggja til heystið og veturin.

SMS • 31 41 44
VERO MODA®











Nýtt stórt úrval av trúlovilsis- og giftingarringum.

3 arin
Ur- & Smúkkudeildin tel. 35 35 31 - e-mail: 3-arin@3-arin.com


# Náttarravnarnir mála býin gulan


*Náttarravnarnir fara at mála býin gulan leygardagin*

**NÁTTARLÍV**
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Í dag er norðurlendskur náttarravnadagur og hetta fer ikki heilt tigandi framvið í Føroyum. Náttarravnarnir í Havn hava knappliga eitt ár á baki og teir fara at nýta leygardagin til at siga almenningin frá teirra virki. Høvuðsendamálið hjá Náttarravnunum er at vera sjónlig í býnum á náttartíð, har tey ungu koma sama, at vera til hjálpar, soleiðis at tey ungu kunnu kenna seg tryggan. Tey hava verið úti hvørt dansikvøld síðan í november í fjør, og tey ungu hava sum heild tikið væl í móti teimum.

Í dag fara Náttarravnarnir at seta eitt borð upp við Sparikassan í gongugøtuni og har verður selt kaffi, kakao, sodavatn og ymiskt heimabakað. Náttarravnarnir fara at greiða fólki frá, hvat tey takast við, býta faldibløð úr og kunna um sjálvt hugtakið, ið er aftanfyri Náttarravnarnar.

Eisini ber til at melda seg sum stuðulslim, hetta kostar 100 krónur um árið. Upp aftur betri er um foreldur melda seg sum virknan lim, tað vil siga, at tey melda seg til eisini at ganga úti um næturnar. Virknu limirnir gera nógv sjálvboðið arbeiði, og tí skulu tey ikki rinda limagjald.

70 limir eru í dag í Náttarravnunum og endamálsgreinin er soleiðis orðað: Endamál felagsins er at virka fyri at gera býin tryggari, so her m.a. verður minni harðskapur, herverk og brotsverk"



# Vinn eitt gávukort á 50.000,– frá eini ferðamannastovu..!




Í sambandi við stóru føðingardagskappingina hjá okkum, hevur lutakast verið millum innsendu svarleparnar úr serliga SMS-ólavsøkublaðnum. Handlarnir, sum luttakararnir skuldu gita navnið á og fáa stempul frá, vóru: Bakarin, Hornið, Heilsa og Elding. Hepnu vinnararnir, í hesum umfari, vóru:

**Tóra Højgaard, Toftir,**
ið vann gávukort á 200,- frá ávíkavist Heilsu og bakaranum

**Arnóra Djurholm, Havn,**
ið vann gávukort á 200,- frá ávíkavist Elding og Horninum.

Høvuðsvinningurin er eitt gávukort áljóðandi kr. 50.000,00 frá eini av okkara ferðamannastovum og drigið verður á 25 ára føðingardegi okkara leygardagin 2. novembur kl. 13.30 á Torginum.

Uppgávan er einføld. Tað ræður um at fáa handlarnar, sum mynd er av á lepanum, at seta sítt stempul undir myndina. Tá ið allir handlarnir hava stemplað lepan, skal hann sendast til:

**SMF**
**Postsmogu 1059**
**110 Tórshavn**
Merkið brævbjálvan "Føðingardagskappingin".

Til tess at vera við í dráttinum hesa ferð, um tveir vinningar frá handlunum í SMS, skal lepin vera okkum í hendi **áðrenn fríggjadagin 20. september**.

Lepin kann eisini verða sendur inn aftaná nevndu dagfesting, men so verður hann bert við í dráttinum 2. novembur um stóru vinningarnar.

## Hvaðan í SMS eru myndirnar..?




***Innsent hevur:***
Navn
Bústaður
Bygd / býur
Telefon